


*Bedingin á Strondum er upprunaliga bygd í sekstiárunum. Tað var Dia Rasmussen, sum bygdi hana. Seinastu sløku 20 árini hevur hetta verið ein familjufyritøka hjá Andersens-ættini*

- Jú, vit bjóða okkum eisini fram innan hvs-arbeiði, men vit gera einki við el-arbeiði, sigur Høgni Ansersen.

## Nanni Diesel

Umframt vanligt bedingsarbeiði, maskinumvælingar og umvælingar av træbátum, glastrevju og stáli, hevur Andersens Beding eisini umboðað Nanni Diesel motorar í nígg-ju ár.

- Hetta eru franskir motorar, sum vit og teir, sum hava keypt hes-ar, hava sera góðar royndir av. Vit hava hesi níggju árini selt einar 70-80 motorar, og eg kann siga, at vit hava ongar eykalutir selt til hesar.

Høgni sigur, at Nanni Diesel verða seldir úr 10 hk. og upp í einar 1000 hk.

- Vit selja ikki stórar skipsmotor-ar, tó at franska fyritøkan eisini framleiðir hesar. Hetta lata vit tey feløgini um, sum arbeiða á tí øki-num, leggur hann aftrat.

Andersens Beding umboðar Nanni Diesel beinleiðis frá verk-smiðjuni í Fraklandi, og tí eru hesir eisini kappingarførir í prísi.

- Nanni Diesel vórðu fyrst fram-leiddir í Italiu. Fyritøkan byrjaði har í 1952, men síðan 1982 eru motorarnir framleiddir í Fraklandi.

Hann sigur, at tá teir bíleggja vanligar slitlutir, sum kunnu vera reimar, filtur og slíkt, tekur tað bara tveir dagar, til hesir eykalutir eru heima í Føroyum.

Eitt annað umboð, sum Ander-sens Beding eisini hevur, er motul olja, sum er motorolja til diesel-og bensinmotorar.

- Oljan er serliga kend sum motorolja til motorsúklur, men er annars egnað til allar motorar, sigur Høgni Andersen.

vilmund@sosialurin.fo



*- Tað er ein fyrimunur í skiftandi tíðum, at arbeiðsplássið er fleksibult, sigur Høgni Andersen, sum saman við trimum øðrum í familjuni eigur Sp/f Andersens Beding á Heygsstøð á Strondum*